Fylgiskjal 6

Umhvørvis- og vinnumálaráðið
Gongin 7
Postrúm 377
110 Tórshavn

Tórshavn 5. januar 2024

Vísandi til tykkara teldupost t. 6. desember 2023, viðvíkjandi uppskoti til lóg og kunngerð um pantskipan fyri íløt, senda vit okkara ískoyti.

Yvirskipað

Pantstøðir og innsavningarstøð
Soleiðis sum lógin er sett saman i dag, er kanska eitt insitament til ikki at hava góða móttøku av íløtum, tí fleiri íløt, jú meira kostnaðarmikið arbeiði. Vit meina, at tað eigur at verða hugt at tí íslendsku skipanini, har pantumsitarin hevur øll innsavningarstøðini og harvið eisini útreiðslurnar. Innflytarar og framleiðarar kunnu so gjalda umsitingargjald til pantumsitaran, í mun til innflutning og framleiðslu. Hesar móttøkur kunnu so staðsetast strategisk runt landið. Soleiðis sleppa smærri handlar og øll onnur eisini undan at gera íløgur í stórar maskinur og dyr høli.

Orðið "kann"
Orði "kann" er nógv brúkt í lógini og kann hetta tykjast´, at lógin verður veik og kann vendast, alt eftir hvørs eygu hyggja at henni. Vit meina at lógin skal brúka orðið "kann" minni og ístaðin kanska brúka "skal" ella líknandi fyri at gera lógina eitt sindur meira greiða og ikki at misskilja.

Tvær, tríggjar ella fleiri sorteringar
Vit hava fingið at vita at sorteringar av íløtum skulu verða tvær - plast/aluminium og glas. Vit skilja hesa skipan soleiðis at hesar báðar skiljingarnar verða koyrdar í bulk til pantumsitaran, tað verið seg í sekkjum, stórum kassum ella øðrum, heil íløt ella kroyst/knúst íløt. Soleiðis sum vit skilja lógina, er hon í stóran mun gjørd til einnýtisíløt, men hvat við endurnýtsluíløtum til føroysk bryggjarí. Skal hetta verða ein triðja sortering í fløskukassar ella hvussu?

Lógin og kunngerðin

§2 stk. 1 í lógini
Vit meina at privat felag skal strikast úr hesari greinini. Vit meta at hetta letur upp fyri at privatir aktørar koma inn við vinningi fyri eyga, sjálvt um tað stendur annarleiðis í lógini. Tað at privatir verða nevndir, meta vit er ein glíðibreyt.

§3 stk. 3 og 4 í lógini
Hvat við tollfríðum vørum? Onkrar tollfríðar vørur hava somu strikukodu sum vørur á landi. Onkuntíð hendir at tollfrítt verður selt til okkurt skip. Vit og onnur vita ikki um hetta skipið kemur aftur til Føroya innan stutta tíð, men tað kann væl henda. Hetta kann henda sjálvt um skipi ikki regluliga er í Føroyum. Soleiðis risikerað vit eisini her, at tollfrítt kemur inn í skipanina. Vit meina tí at best hevði verið um pant var á øllum vørum, eisini á tollfríðum vørum.

§1 stk. 2 í kunngerðini
Her stendur um ymisk undantøk fyri pant, so sum kaggar, størri dunkar osfr. Vit meina at smærri fløskur so sum miniaturur eisini skulu hava undantak. Hetta er reint praktisk. Fløskuautomatirnar klára ikki at taka hesa fløskurnar. Tí meina vit at íløt undir 15 cl. skulu eisini verða undantikin pant.

§7 stk. 7
Tað er forstáiligt at eitt felag av onkrari orsøk skal strikast, t.d.. við uppathald. Men alt annað líka hevur pantumsitarin fingið pening fyri seldu íløtini, so her hevði verið uppá sítt pláss, at haft eina skiftistíð uppá einar 3-4 mánaðir áðrenn vørurnar verða endaliga strikaðar, soleiðis at kundin hevur ein møguleika at fáa sítt pant aftur.

§8 stk. 6
Fyri brúkarans skyld mæla vit til, at bryggjaríini eisini skulu taka móti øllum íløtum. Meiningin í lógini er, at tað skal verða so ómakaleyst fyri brúkaran at sleppa av við síni íløt.

§14 stk. 3

Í §14 stk. 3 stendur at pantumsitarin kann biðja um at grannskoðan verður framd viðv. rættleikanum hjá framleiðara ella innflytara fyri at eftirkannað rættleikan. Um so er at alt er rætt, so skal pantumsitarin gjalda grannskoðanina og um ikki alt er rætt, so er tað innflytarin ella framleiðarin, ið skal gjalda grannskoðanina.

Hetta samsvarar ikki við §9 stk. 4 í lógini, ið sigur at innflytarin ella framleiðarin skal gjalda grannskoðanina. Her skal innflytarin ella framleiðarin gjalda óansæð.

Vinarliga heilsan

Jan Arabo
Fíggjar- og fyrisitingarleiðari

RÚSDREKKASØLA
LANDSINS